## Nýggi Dagstovnurin í Sørvági søkir eftir einum stuðulsfólki

Starvið snýr seg um eitt barn við fysiskum breki.

**Uppgávurnar eru m.a. at :**

- vera um og stimbra barnið í samspæl við onnur børn á stovninum
- stimbra fysisku førleikarnir hjá barninum
- fara við barninum til venjingar/fysioterapi o.a.

**Arbeiðstíðin.**
Er 40 tímar um vikuna. Starvið verður sett 1. august 06 ella eftir nærri avtalu

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarar, ið hava útbúgving sum pedagogar og starvsfólk við líknandi royndum hava fyrimun til starvið.

Meira fast at vita um starvið við at venda sær til Gitta av Kák leiðara á dagstovninum

**Løn og setanartreytir:**
Sambart sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Í lønarflokki 3 til 8 fyri hjálparfólk og 11 til 18 fyri pedagogar.

Umsókn saman við útbúgving, royndum og møguligum viðmælum, skulu sendast innan 23.07.06 til :

**Nýggi Dagstovnurin í Sørvági**

Att: Gitta av Kák
Varðagøta 8
Fo-380 Sørvágur

Viðmerkjast skal :„ umsókn"

Um ikki nóg nógvar umsóknir eru, tilskilar Sørvágs Kommuna sær at søkja av nyggjum.

Fo-380 - Sørvágur • Tlf. +298 332004 - Fax. +298 332952
Email: sorvag@sorvag.fo - www.sorvag.fo

## Hjálparfólk

Søkt verður eftir hjálparfólki til umlættingina 20 tímar um vikuna at byrja 1. august 2006

Vit sóknast eftir starvsfólki, sum hevur fakligan áhuga og góð samstarvsevni.

Vit bjóða eitt arbeiði har tú hevur ávirkan á innihaldi í starvinum og gerandisdagin hjá búfólkunum. Sum er m.a. úti virksemir, svimjing og gongutúrar.

Umlættingin á Garðavegi er ein stovnur fyri børn og ung við sjúkragreiningini autisma.

Á stovninum starvast 7 fólk.

**Løn og setanartreytir:**
Talan er um eitt starv innan Heimarøktina og Serforsorgina. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, talan er um bæði dag-, kvøld- og samdøgursarbeiði; eins og vikuskiftisarbeiði og serstakir dagar.
Løn sambært sáttmálað við F. Pedagogfelag og fíggjarmálaráðið.

**Umsóknarfreist :**
Umsókn við hjálagdum próvskjølum og viðmælum skulu verða stovninum í hendi seinasta lagi 22 juli
Nærri upplysingar um starvið fæst við at venda sær til leiðaran á stovninum á tlf. 456320 el. 229787

**Umlættingin á Garðavegi**
Garðavegur 38, 700 Klaksvík
Att. Leiðarin

## TEYMAVIRKIÐ

# Handilslærlingur
## til Teymavirki í Runavík

**Teymavirkið** í Runavík sóknast eftir handilslærlingi at byrja skjótast møguligt. Størsti parturin av fyrsta árinum fer fram í Leikabúðini.

**Vit bjóða** eitt starv á einum fjølbroyttum arbeiðsplássi í støðugari menning, har samstarv við arbeiðsfelagar, veitarar og kundar er av alstórum týdningi.

**Arbeiðstíðin** verður 40 tímar um vikuna og roknast kann við at arbeiða annan hvønn leygardag.

**Vit vænta**, at tú hevur FHS- ella HH-prógv. At tú ert fyrikomandi, arbeiðssamur og fleksibul persónur, sum dugir væl at samstarva, men eisini arbeiða sjálvstøðugt.

**Umsókn** við avriti av prógvum, møguligum ummælum og CV skulu verða Teymavirkinum, Boks 210, 620 Runavík, í hendi í seinasta lagi mánadagin 17. juli 2006.

**Meiri** fæst at vita við at venda sær til Maluna Nielsen á tlf. 47 30 21.

Teymavirki í Runavík og Snørisvirki í Klaksvík eru einastu fyri-tøkur í Føroyum, i framlei a línu, teymar og togverk. Bæ i virkini hava skipshandlar, har m.a. arbei sklæ i og trygdarútger er at fáa. Harafturat hevur Teymavirki bún tis- og klædnadeild. Í alt eru 20 fólk í starvi hjá Teymavirkinum og Snørisvirkinum.

## Útbjóðing

Vegna Fuglafjarða kommunu verður við hesum arbeiðið í sambandi við veitan og uppseting av 600 m av kantsteini í Stovugerði í Fuglafirði, boðið út í almenna lisitatión.

Lisitatiónin vreður á kommunuskrivstovuni í Fuglafirði týsdagin 18. juli 2006 kl. 13.30.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast til í seinasta lagi týsdagin 11. juli kl. 10.00.

**sp/f Teknistovan**
v. Jens Kl. Jacobsen og Henning Olsen
ráðg. Byggifrøðingar
FO- 510 Gøta
tel: 44 21 05 · fax: 44 21 07
email: klement@post.olivant.fo

## Sørvágs Kommuna

### Søkir eftir Vaskifólki

Talan er um 3 størv á 4 tímar í nýggja dagstovninum í Sørvági.
Arbeiðstíðin er frá kl 17.00

Størvini verða sett 07.08.06

**Løn og setanartreytir:**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Umsókn saman við møguligum viðmælum, skulu innan 23.07.06 sendast til:

**Sørvágs Kommuna**
Att: Gitta av Kák
Varðagøta 8
Fo-380 Sørvágur

Viðmerkjast á brævbjálvan: „vaskifólk"

Fo-380 - Sørvágur • Tlf. +298 332004 - Fax. +298 332952
Email: sorvag@sorvag.fo - www.sorvag.fo

## Vága Fysioterapi

Vit hava opið alt summarið og hava fingið

nýtt tlf. nr:

332007

Vinarliga

| | | |
|---|---|---|
| Hjørleif Niclasen<br>Fysioterapeutur<br>Cert. MDT. | Gerda Nattestad<br>Fysioterapeutur<br>Cert. MDT. | Klæmint Isaksen<br>Fysioterapeutur |

## Námsfrøðingur til Frítíðarskúlan í Fuglafirði

Frítíðarskúlin í Fuglafirði søkir eftir námsfrøðingi, at arbeiða 30 tímar um vikuna, frá 14. august 2006.

Frítíðarskúlin heldur til í skótahúsinum »Kambur« á Kambsdali og er ætlaður børnum, sum ganga í 1. og 2. flokki.

**Vit bjóða:**
- áhugavert og avbjóðandi starv
- rúm fyri nýhugsan
- náttúruvakurt umhvørvi

**Vit vænta at tú:**
- kann taka ábyrgd
- dámar væl at vera úti
- dugir væl at samskifta og samstarva.

Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya. Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jógvan Philbrow leiðara tlf. 227385.

Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu vera býráðsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 1. august 2006 kl. 10.00.

**Fuglafjarðar kommuna**
Norður í Gerði 10B
FO-530 Fuglafjørður

Kommunan skilir sær rætt til at velja millum innkomnu umsókirnar ella onga at taka.